

## Almannastovan søkir

# samskipara / skrivara

**Á Stjórnardeildini eru 3 starvsfólk í fulltíðarstarvi og ein deildarleiðari. Starvsøkið hjá Stjórnarskrivstovuni fevnir um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk í sosialfakligum, løgfrøðiligum og øðrum fyrisitingarligum spurningum, ger av innanhýsis leiðbeinandi reglum og kunningartilfari, kæruummæli, ummæli av lógar- og kunngerðaruppskotum o.a.**

**Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygd og virðing fyri einstaklinginum. Virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum**

Vit sóknast eftir einum persóni við løgfrøðiligari ella aðrari samfelagsligari útbúgving frá hægri lærustovni ella einum persóni við sosialráðgevaútbúgving og royndum innan almannafyrisiting at samskipa arbeiðið við málum um fyritíðarpensjón.

Okkara ynski eru, at tú dugur at arbeiða sjálvstøðugt, hevur góð samstarvsevni, góð evni at orða teg skrivliga sum munnliga og hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði.

Hevur tú hug at royna teg í einum livandi tvørfakligum og fjølbroyttum arbeiðsumhvørvi, har samskipan og samstarv við onnur starvsfólk hevur serligan týdning í arbeiðnum, er hetta nakað fyri teg.

Uppgávan verður at fyrireika mál um fyritíðarpensjón og tryggja, at tey eru væl lýst, áðrenn tey verða løgd fyri Pensjónsfundin, sum tekur avgerðir um tillutan av fyritíðarpensjón. Tú kemur at virka sum skrivari á pensjónsfundinum. Uppgávan kemur somuleiðis at umfata tilevnan og endurskoðan av leiðbeiningum, skipan av økinum o.t. Í tann mun tað er møguligt við atliti til høvuðsuppgávurnar, kemur tú at luttaka í øðrum arbeiði á stjórnardeildini.

Í arbeiðnum kemur tú at hava tætt samskifti og samarbeiði við tær deildir á stovninum, sum gera tilráðingar um tillutan av fyritíðarpensjón, herundir serliga arbeiðsmarknaðardeildina.

Tú verður sett/ur við tilvísing til leiðaran á stjórnardeildini á Almannastovuni.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Mariu Jacobsen, deildarleiðara, ella Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra á tel 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 30. oktober 2006, kl. 12.

Vinarliga merkið brævbjálvan:
"samskipari/skrivari"
og send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

# TÍÐARAVMARKAÐ STARV TIL KT-VERKÆTLAN

Hagstovan hevur sett sær fyri at smíða eina nýggja hagtalsliga virkisskrá. Hon skal veita okkum dagført yvirlit yvir fyritøkur og stovnar - hvar tey halda til, hvat tey takast við, hvussu stór tey eru osfr..
Vitanin um fyritøkurnar stavar fyrst og fremst frá skipanum hjá Toll- og Skattstovuni og Skráseting Føroya. Ætlaða telduskipanin skal vera stuðulin í arbeiðinum at vinda hagtalsligar upplýsingar burtur úr umsitingarliga upprunatilfarinum.

Okkum tørvar eitt fólk til at vera við til at snikka bygnað og dátustrukturar saman og til at forrita skipanina.
Goymsluskipanin er Oracle og forritingin av brúkaramarkamóti verður at gera við Oracle Internet Developer Suite ella øðrum líknandi amboð.
Arbeiðið fer fram í samstarvi við KT deildina og hagfrøðingarnar á Hagstovuni.

Ongi serstøk krøv eru til útbúgving, men dentur verður lagdur á førleikar og royndir. Starvið er avmarkað til eitt ár og verður lønt eftir sáttmála millum avvarandi felag og Fíggjarmálaráðið.
Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1.novembur.
Vil tú vita meiri um starvið, so set teg í samband við Axel Nolsøe ella Berg Dam á Hagstovuni, telefon 352800.

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

TEAM85